# Maggi Gunnarsson 50 ár



*Her er Maggi avmyndaður í Trollhättan í Svøríki saman við fyrsta Saab-bilinum, sum yvirhøvur er framleiddur, tað var í 1946. Hann kallast Ursaab 92001*

Í dag fyllir, Magnus Gunnarsson, betur kendur sum Maggi, 50 ár.

Maggi er havnarmaður, sonur Eigil og Jenny Gunnarsson. Hann eg giftur Birgitte. Tey eiga fýra børn og búgva í Gæsugøtu í Havn.

Maggi fór í læru sum bilmekanikari hjá Johs. Berg seinast í sekstiárunum, helst var tað í 1968. Hetta var beint eftir, at Mazdaævintýrið í Føroyum byrjaði. Fyrsti Mazdabilurin kom til landið árið fyri, og skjótt var hann populerasti bilurin í landinum.

Maggi hevur altíð havt áhuga fyri bilum, og hann hevur fingist nógv við bilar. Tað fór ikki eitt kvøld, leygardagur ella frídagur annars, har tú ikki hoyrdi bukan, bankan og slípan úr garasjuni hjá Eigili í Dalatúni við Dalavegin, har Maggi vaks upp. Hann var altíð í sving, og mangar buglur eru rættaðar út har.

Eftir lokna útbúgving starvaðist Maggi nøkur ár hjá Hanseman Gaard, sum seldi Citroën bilar á Velbastaðvegnum. Eisini arbeiddi hann á bugluverkstaðnum hjá Carlo Petersen í Tórfinsgøtu í nøkur ár, til hann fór í starv hjá á Super Dekk Service hjá Sámali Bláhamar. Har var hann í fleiri á, til hann fór at koyra buss.

Maggi hevur eisini roynt tað, sum fáur maður hevur roynt: Hann hevur verið heimagangandi húsfaðir! Hetta var í trongu árunum fyrst í nítiárunum. Tey høvdu fýra børn, og Maggi tók á seg uppgávuna at passa børnini og halda hús og heim. Hetta starvið røkti hann í tvey ár.

Seinni fór hann á Posthúsið, og starvast hann sum bilførari hjá Postverkinum, og kemur hann víða um landið í hesum starvi.

Seinastu góðu tvey árini hevur Maggi eisini roynt seg sum blaðmaður á Sosialinum, har hann fæst við at skriva um bilar. Hann er eisini aktivur limur í Føroya Ellisakførum og í hesum sambandi fæst hann m. a. við at savna tilfar til eina bók um føroysku bilasøguna.

Maggi er burturstaddur á føðingardegnum, men vit á blaðnum ynskja honum hjartaliga tillukku!

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum á ein og annan hátt gjørdu okkum silvurbrúdleypsdagin 24. juli 2001 so hugnaligan og minnisríkan, takka vit hjartaliga.

Blíðar heilsur
**Magna og Hans Martin Jacobsen**
Fuglafjørður

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá ið okkara kæri

**Jákup Olsen**

doyði og varð jarðaður. Tøkk fyri kransar, blómur og aðrar heilsanir, og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Annita og Hanus**
**Ingibjørg, Marjun og Karin**


## TVÍHÚS Á KAMBSDALI

- í friðaligum og náttúrvøkrum umhvørvi
- gott bussamband
- tætt við Studentaskúlan og Handilsskúlan

**er hetta nakað fyri teg?**







**Í verkætlanini eru tvey húsasnið.**
**- 1 planhús við lofti og bilhúsi**
**- hús við kjallara, miðhædd og bilskýli**

**Sámuligir prísir og skjót byggitíð**

**Vilt tú vita meira um hesa verkætlan, so ring til okkum**

**RAÐHÚS**
**FO-510 Gøta**
**Tlf. 21 19 29**








Nú kunnu øll keypa sær ein bita av Norðurlondum. Íløgufeløg geva smáspararum møguleika at gera íløgur og fáa teir fyrimunir, sum stórir íleggjarar hava.

**Norrøn partabrøv**
Eitt nýtt íløgufelag er »Norrøn partabrøv«. Her ganga fólk saman um at gera íløgur í stór og viðurkend norðurlendsk partafeløg.

Dentur verður lagdur á at spreiða íløguna við at seta pening breitt í norðurlendskar vinnugreinar. Tað ger íløguna tryggari.

**Lánsbrøv í donskum krónum**
Tú kanst eisini gera íløgur í felagið »Lánsbrøv í donskum krónum«. Íløgurnar verða gjørdar í lánsbrøv, sum eru útgivin av danska statinum og øðrum útgevarum við høgum kredittvirði. Lánsbrøv eru tryggari íløga enn partabrøv, men partabrøv kasta meira av sær.

Íløguprógvini kunnu keypast hjá Kaupthing Føroyum ella Føroya Sparikassa.

FØROYA SPARIKASSI
Tel 34 80 00 • Fax 34 83 48 • www.sparikassin.fo

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn • tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo